# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fylgibólkurin

Tað er skilagott av landsstýrinum at seta politiskan fylgibólk at viðgera pensjónsuppskotið hjá embætisfólkunum. Tað eigur at vera vanlig politisk mannagongd at geva embætismannauppskotum gjølliga politiska viðgerð. Tað verður gjørt alt ov lítið av hesum í Føroyum, og tí koma landsstýrisfólk mangan í trupulleikar av embætismannauppskotum, sum uttan politiska viðgerð fara fyri Løgtingið.

Politiski fylgibólkurin skal tryggja breiða undirtøku fyri endaliga uppskotinum og ansa eftir, at hetta álvarsama og týdningarmikla mál ikki endar sum politiska kastibløka millum flokkarnar á Løgtingi. Bólkurin hevur fingið munnkurv frá fíggjarmálaráðharranum, og tykist tað vera ein ávís misnøgd við hesa avgerð. Avgerðin er fyri at tryggja politiska bólkinum arbeiðsfrið og kann avgerðin tí tykjast neyðug. Hinvegin er torført at skilja, hvat skaða opinleiki kring hetta mál skal kunna gera.

Embætismannauppskotið hevur elvt til misnøgd millum fleiri samfelagsbólkar, serstakliga orsakað av tilmælinum um pensjónsaldurin og tilmælunum um fíggingina av framtíðar pensjónsskipanum. Tað er væl skiljandi, at fakfeløgini hjá teimum lagstløntu eru ivasom og vilja hava ein sterkan almennan leiklut í framtíðar pensjónskipanini. Hinvegin man vera breið semja um, at ein framtíðar pensjónskipan skal hava trý fíggjarlig bein at standa á. Nú ræður um hjá politiska bólkinum at finna eina semju um hesi trý fíggjarligu bein og ud pansjónsaldurin.

Politiski fylgibólkurin hevur nú eitt einastandandi høvi at finna eina semju um framtíðar pensjónskipan Føroya, og er hetta tískil eitt mál, sum røkkur langt fram í tíðina. Tað er einki yvir at dylja, at forsorgarbyrðan verður tung hjá teimum arbeiðsføru um eini fimtan til tjúgu ár, um vit ikki her og nú í breiðari semju finna fram til eina haldgóða skipan. Tað er umráðandi, at skipanin fevnir um avísar trygdir ella garanti, eitt nú, at tann skipan, sum einaferð kemur, ikki verður innanholað eitt nú av skattum og avgjøldum. Tær fíggjarligu fortreytir, sum eru galdandi her og nú, eiga eisini at verða galdandi um tjúga ella trýati ár, tá útgjøldini skulu fremjast.

Tað er júst á hesum øki, at ABC2 hevur syndað, nevniliga við knappliga og uttan ávaring at broyta grundleggjandi fortreytir fyri galdandi pensjónskipanum. Tað er tað, sum er hent við ólavsøkupakkanum og ætlaðu mótrokningunum og skattabroytingum á pensjónsøkinum. Tey, sum í dag eru fólka- ella fyritíðarpensjonistar hava lagt síni ellisár til rættis eftir galdandi fíggjarligum fortreytum. Tá myndugleikarnir knappliga og uttan ávaring broyta hesar fortreytir, gera teir seg í veruleikanum inn á ein stóran part av pensjónistunum og skerja teirra lívskor. Hetta er bæði skeiv, órmoralskt og hartil politiskt sera illa umhugsað. ABC2 eigur tí at gloyma alt um at fíggja ólavsøkupakkan við peningi hjá fólka- og fyritíðarpensjonistum og at síggja til, at arbeiðið hjá politiska fylgibólkinu kemur trygt í havn.

**Sosialurin**

# Ísland ávirkar meðan Føroyar sita uttanfyri



**EDMUND JOENSEN**
løgtings- og fólkatingsmaður

Samstundis, sum Ísland og Europasamveldið setast við samráðingarborðið, skal nýggi fiskivinnupolitikkurin hjá ES tilevnast. Nógv talar fyri, at Ísland sleppur at ávirka nýggja politikkin. Um somu tíð venda almennu Føroyar Europasamveldinum bakið. Fyri at fáa ávirkan, eigur Landsstýrið at saðla um í Europapolitikkinum.

Ísland skalv í grót og grund, tá avgerðin um at søkja ES-limaskap varð tikin.

Hetta var ein av fleiri sera torførum avgerðum, ið íslendska stjórnin hevur tikið til seinasta árið.

Aðrar truplar avgerðir eru tær um yvirtøkuna av bankunum og kanningin av bankakrakkinum.

Hart leikaði á, men íslendska stjórnin stóð tó sum kletturin, tá avtornaði, og nú hevur hon lagt tungu avgerðirnar aftur um seg, manniliga og ábyrgdarfult fyri íslendska fólkið.

Stjórnin hevur nú so skilagott ruddað vegin fyri fótonglar, so farast kann undir samráðingar við ES beinanvegin.

### Ávirkan á fiskivinnupolitikkin

Samstundis, sum Ísland og Europasamveldið setast við samráðingarborðið, skal nýggi ES-fiskivinnupolitikkurin tilevnast.

Tann sonevnda Grønbókin er skrivað, og fiskivinnupolitikkurin er úti til hoyringar hjá almenningi og áhugabólkum fram til ársskiftið.

Hetta er helst ein góður møguleiki hjá Íslandi at fáa ávirkan á komandi fiskivinnupolitikkinum í samveldinum, sum Ísland er á veg inn í.

Tað er nú, tann lagaligan løtan er. Nýggi fiskivinnupolitikkurin, sum skal setast í verk í 2012, liggur opin og kann ávirkast. Svøríkið hevur formanskapin í ES, og Finnland hevur ES-kommisserin fyri víðkan av ES.

Fyri norðurlandið Ísland peika pílarnir til ávirkan rætta vegin, hóast samráðingarnar kortini kunnu gerast torførar.

### Seinni er ov seint

Eftir nýggjár verður so farið víðari í politisku prosessini, og Hvítbókin um fiskivinnupolitikkin verður skrivað.

Tað mest sannlíka er, at tey londini, sum koma aftaná, ikki fáa møguleikan at ávirka men hinvegin mugu taka við tí, sum er samtykt og galdandi.

Alt hetta hevur leiðslan í íslendsku stjórnini skrivað sær aftan fyri oyrað, og avgerðin um at søkja limaskap í ES er eisini tikin út frá hesum veruleika.

Seinni er ov seint at vilja ávirka politikkin í ES. Eisini hetta munnu íslendingar vita.

### Vit vilja sita uttanfyri

Hóast Føroyar – eins og Ísland – hava stórar politiskar og búskaparligar interessur í nýggja fiskivinnupolitikkinum hjá ES, fræltist onki um, at okkara landsstýrið hevur í umbúna at søkja sær ávirkan á nakran hátt.

Hjá okkum er tað framvegis tann doyggjandi EFTA-limaskapurin, ið stendur ovast á pappírinum í Uttanríkisráðnum.

Hetta er púra burturvið.

Føroyar eiga hóast alt eina av best virkandi fiskivinnuskipanum í heiminum, so okkara rødd átti at verið áhugaverd at hoyrt.

### Norðurlendska dimensjónin

Trupulleikin er, at ein íslendsk samráðing um ES-limaskap kann enda við at seta rammurnar fyri nýggu fiskivinnuskipanina hjá ES. Vit vita, at Ísland er í eini torførari útgangsstøðu til ES-samráðingarnar, og avleiðingin kann verða, at avtalan millum Ísland og ES verður verri enn tann, ið Føroyar kundu fingið.

Tí eiga vit, eisini fyri okkara egnu skyld, og fyri at betra okkara egnu møguleikar í framtíðini, at arbeiða fyri at verða við í tilgongdini.

Tað heilt rætta hevði verið, at bæði Ísland, Føroyar og Noreg tóku saman hendur fyri at ávirka nýggja fiskivinnupolitikkin hjá ES. Helst hevði tað givið nakrar nýggjar møguleikar fyri øll londini.

Heldur ikki hetta sjónarmið fræltist nakað um í okkara landsstýri.

### Áheitan á egið landstýrið

Orsøkin til, at Føroyar eiga at nærkast ES og gerast partur av samveldinum, er enn sum áður púra greið. Tíðin við tjóðum, sum arbeiða einsamallar í heiminum, er farin. Ì dag er tað av størsta týdningi at verða partur av altjóða samstarvi og at tryggja atgongd til marknaðin, tilfeingi, samstarv, vitan o.s.fr.

Tí má ABC-landsstýrið saðla um í ES-málinum. Mest umráðandi málið í føroyskum politikki í dag er ES-málið og íslendska avgerðin at søkja um ES-limaskap.

Føroyska avgerðin má takast nú, so vit koma við í tilgongdina og kunnu ávirka hana.

Alt annað er ábyrgdarleyst.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.